

Katrin Dahl Jakobsen, løgtingskvinna Javnaðarfloksins vil hava Signar á Brúnni at svara, um farast skal aftur til gomlu fólkaskúlalógina

# Foreldur og næmingar eru offur í stríði

*Um so er, at fólkaskúlalógini verður ikki lív lagað, heldur landsstýrismaðurin so, at frægast hevði verið at farið aftur til gomlu lógina? vil Katrin Dahl Jacobsen m.a. hava at vita frá Signari á Brúnni*

ÓLAVUR Í BEITI

Katrin Dahl Jacobsen hevur nú sett undirvísingarmálaráðharranum fyrispuring um nýggju fólkaskúlalógina, og vil m.a. hava at vita frá Signari á Brúnni, um hann heldur tað vera rætt og hóskiligt, at lógarásettar uppgávur í fólkaskúlanum verða gjørdar upp sum partur av lønar- og sáttmálasamráðing? Eisini spyr hon, um landsstýrismaðurin er nøgdur við, at lógarábyrgdarøki hansara stendur og fellur við, hvussu avvarandi fakfelag hepnast í eini lønarsamráðing? Og Katrin Dahl Jacobsen vil eisini hava at vita í hvønn mun landsstýrismaðurin heldur verkfallið í fólkaskúlanum vera ein politiskan trupulleika ella ein fakfelagstrupulleika?

Og í 6 spurningi, verður spurt, um so er, at fólkaskúlalógini verður ikki lív lagað, heldur landsstýrismaðurin so, at frægast hevði verið at farið aftur til gomlu lógina? Ella hevur landsstýrismaðurin í hyggju at strika tær greinar, sum ikki ber til at røkja við verandi játtan? Ella ætlar hann at koma í tingið við umbøn um neyðugu játtanina?

## Dýrari

Í viðmerkingunum til fyrispurningin, sigur Katrin Dahl Jacobsen m.a., at tá Løgtingið í 1997 viðgjørdi nýggju fólkaskúlalógina, gjørdu Føroya Lærarafelag, Tórshavnar Skúlaráð, løgtingslimir og onnur vart við, at nýggja lógin fór at kosta væl meira, enn hildið var.

Katrin Dahl Jacobsen sipar eisini til svar frá landsstýrismanninum, har sagt verður, at »hóast umbønir og frágreiðingar í sambandi við økta virksemið á fólkaskúlaøkinum við nýggjari løgtingslóg um fólkaskúlan umframt lønarvøkstur, so fekk landsstýrismaðurin ikki lagað fíggjarkarmin fyri ár 2000 í nóg stóran mun til økta virksemið, sum ætlað í fólkaskúlanum«.

– Fíggjarnevndin tekur til eftirtektar tað, sum mentanarnevndin hevur víst á, og spyr landsstýrismannin um hesi somu viðurskifti. Landsstýrismaðurin svarðar fíggjarnevndini orðarætt tað sama, sum mentanarnevndini, og leggur afturat , »Tí er fólkaskúlin noyddur at seta sítt virksemi hareftir. Við teimum fortreytum, sum liggja til grund fyri fíggjarætlanini, fer játtanin ætlandi at halda«.

– Sostatt er ilt at skilja, hví landsstýrismennirnir báðir, Signar á Brúnni og Karsten Hansen, lata foreldur og næmingar vera offur í einum stríði, tá teir eftir øllum at døma ikki halda seg vera førar fyri at skapa líkindi fyri nýggju fólkaskúlalógini. At fólkaskúlin fór at verða raktur av verkfalli, mundi fyri tey flestu vera óhugsandi. Eisini hetta er søguligt fyribrygdi, sigur Katrin Dahl Jacobsen m.a. í viðmerkingunum.




# Verandi tyrlutilbúgving er ikki nóg góð

*– at hon tryggjar bæði sjófólki og útoyggjafólki ta bestu og neyðugu trygdina, sigur Jørgen Niclasen í svari til Torbjørn Jacobsen sum hevur spurt um tyrlutilbúgving í Føroyum*

ÓLAVUR Í BEITI



Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, spurdi fiskimálaráðharran tveir spurningar, og vildi Torbjørn Jacobsen fyrst hava at vita, um landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum metir, at tyrlutilbúgving í Føroyum er føroyskt ella danskt ábyrgdarøki? Og so vildi hann eisini hava at vita, um landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum metir, at tyrlutilbúgvingin í Føroyum er nóg góð og munadygg, soleiðis at hon kann tryggja sjófólki okkara og útoyggjafólki ta bestu og ta neyðugu trygdina?

## Samstarvsavtala

Viðvíkjandi fyrra spurninginum, svarar fiskimálaráðharrin, at tyrlutilbúgvingin er knýtt aftrat sjóbjarging, sum er føroyskt sermál og ábyrgdarøki hjá Føroyum. Við gildi frá 1. januar 1969 varð sjóbjargingartænastan løgd til Færøernes Kommando og frá 1978 varð ásett, at Vaktar- og bjargingartænastan skuldi taka sær av tí føroyska partinum.

– Ein samstarvsavtala varð gjørd partanna millum, sum er í gildi enn. Tyrlutænastan er ein partur av bjargingartænastuni og í nógv ár hevur tann danska tyrlan á sjóverjuskipum teirra verið nýtt til hesa uppgávu. Í nógvum førum verður eisini tann føroyska tyrlan nýtt til leiting og bjarging á sjógv og landi og sjúkraflutning.

Og hinum spurninginum svarar Jørgen Niclasen, at verandi tyrlutilbúgving er ikki nóg góð og munadygg, at hon tryggjar bæði sjófólki og útoyggjafólki ta bestu og neyðugu trygdina. Royndir og samstarv við sjóverjutyrluni og teirri føroysku tyrluni í arbeiðinum um leiting og bjarging á sjógv og landi, sjúkraflutningi og tá vanlukkur henda vísa, at tað altíð mugu verða minst tvær tyrlur tøkar. Fyri at bøta um viðurskiftini hevur landsstýrismaðurin tikið stig til at seta av pening á fíggjarlógini, sum løgtingið hevur samtykt, til tess at bøta um hesi viðurskifti. Fiskimálastýrið fer nú undir samráðingar við Atlantsflog um ein 10 ára sáttmála til tess at tryggja eina munabetri tænastu.





Anfinn Kallsberg úr Fólkaflokkinum og Bent Bentsen, formaður í tingbólkinum hjá danska Konservativa fólkaflokkinum, beint eftir flokspolitiska fund teirra týsdagin

**Føroyska Tíðindastovan**

# Danir skulu sannførast áðrenn aðalorðaskiftið

*Fundurin millum Anfinn Kallsberg og Bent Bentsen mikudagin var ein flokspolitiskur fundur. Men í næstum fer landsstýrið kunningarferð til Danmarkar at fáa danskar flokkar at skilja fullveldismálið*

JOHN JOHANNESSEN

Hóast eingin beinleiðis niðurstøða spurdist burturúr fundinum millum føroya løgmann og tingbólkin hjá danska Konservativa Fólkaflokkinum mikudagin, er løgmaður kortini væl nøgdur.

– Eftir fundin kendi eg, at Konservativi Fólkaflokkurin betur skilir sáttmálauppskot landsstýrisins til samráðingarnar um ríkisrættarligu støðuna, sigur Anfinn Kalsberg.

Løgmaður vísir tó á, at hesin fundurin ikki er ein liður í ætlaðu kunningarferðini, landsstýrið fer undir í Danmark, áðrenn aðalorðaskiftið á fólkatingi um fullveldismálið.

– Hesin fundurin var ein fundur millum tveir politiskar flokkar, har eg var við sum umboð fyri bróðurflokkin í Føroyum. Fundurin var avtalaður fyri langari tíð síðani, og var ætlanin, at hann skuldi haldast í februar. Men í februar lá ikki fyri at halda fundin, og varð hann tí útsettur til 22. mars, greiðir Anfinn Kallsberg frá.

Løgmaður vísir sostætt aftur, at fundurin við tingbólkin hjá Konservativa Fólkaflokkinum hevði nakað við úrslitið av samráðingarfundinum 17. mars at gera, hóast hetta kortini gjørdist høvuðsevni á fundinum.

## Skulu greiða frá ynskjunum

Men landsstýrið ætlar sær at fáa danir at skilja fullveldisætlanina áðrenn aðalorðaskiftið um hana á fólkatingi 6. apríl.

Tískil fer landsstýrið til Danmarkar í næstum at halda kunnandi fund fyri fólkatingslimum. Á hesum fundi vónar landsstýrið at danir fara at skilja, hvat tað er, sum føroyingar í veruleikanum vilja. Eftir hansara tykki hava danir misskilt ynski føroyinga, og tí er neyðugt við kunnandi fundum.

Løgmaður ásannar, at skal vitjanin hjá Konservativa Fólkaflokkinum metast sum ein vitjan av Føroya løgmanni, eigur hann eisini at fara runt at vitja hinar flokkarnar. Men vitjanin skal metast sum ein flokspolitiskur fundur millum tveir bróðurflokkar, har Anfinn Kalsberg umboðaði Føroyar sum umboð fyri Fólkaflokkin.

## Mugu finna semju

Løgmaður vónar, at ætlaða vitjanin í Danmark fer at skapa betri gundarlag fyri at finna eina semju millum landsstýrið og donsku stjórnina í fullveldismálinum.

Men hann vísir á, at fyri at tað skal bera til at finna slíka semju, er neyðugt, at landsstýrið og danska stjórnin finna út av, hvat tað í veruleikanum er, partarnir eru ósamdir um.

– Danir tosa um eina skiftistíð á trý til fýra ár, men samstundis verður einki nevnt um nakra ávísa peningaupphædd, sigur løgmaður og gevur okkum ábendingar um, at tað kanska ber til við eini skiftistíð á trý ár, er skiftistíðin tann rætta.

Løgmaður vísir á, at tá føroyingar tosa um skiftistíð, verður ikki bert hugsað um konkretu fíggjarligu skiftistíðina, men eisini um ein sálarliga skiftistíð. Fólk skulu nevniliga kenna seg trygg.

Tað er enn ikki heilt avgjørt nær landsstýrið fer til Danmarkar at kunna fólkatingið um fullveldisætlanina, men heilt greitt er kortini, at tað verður áðrenn aðalorðaskiftið á fólkatingi 6. apríl.

